# Markleys útbúgving leggur frá landi

**Aftur í ár hevur lestrarstevnan Markleys útbúgving eina sera spennandi skrá við framløgum og kunning úr nógvum ymiskum londum, lærustovunum, felagsskapum og virkjum umframt undirhaldi við Føroya festligasta tónleikabólki**

VITAN
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tá lestrarstevnan Markleys Útbúgving 2006/07 leggur frá landi hósdagin 28. september kl.10, so er ikki bert talan um ein talumáta, tí stevnan er umborð á Smyrli. Umframt kunning um leyst og fast viðvíkjandi lestri, verður tónleikur við Føroya glaðasta bólki Lama Sea, ella kanska í hesum føri Lama "AT" Sea.

Á lestrarstevnuni vera umboð úr nógvum ymiskum londum, lærustovunum, felagsskapum og virkjum, og fyrilestrar og kunning er allan túrin í Matstovuni og í Fundarrúminum.



*Lama Sea stendur fyri tí meira festliga partinum av lestrarstevnuni umborð á Smyrli*
*mynd: Álvur*

Til ber eisini at hitta fólk, sum arbeiða umborð á Smyrli og hoyra tey greiða frá um teirra útbúgving og starv. Tað eru tríggir starvsbólkar, sum greiða frá: á brúnni í maskinrúminum í køks- og tænastudeildini.

– Útbúgving er sera avgerandi, bæði fyri tann einstaka og fyri samfelagið. Útbúgving – styttri ella longri – er næstan ein treyt, skalt tú fáa eitt spennandi og mennandi lív. Í samfelagi okkara er náttúrutilfeingið ikki so stórt. Tí er tað av alstórum týdningi, at tey ungu fáa útbúgvingar, um vit skulu klára at halda livistøðinum í altjóða kappingini. Markleys Útbúgving 2006/07 roynir at lata upp fyri teimum mongu ókendu valmøguleikunum, sum finnast bæði nær og fjar, sigur Holgar Arnbjerg, ið samskipar tiltakið vegna Mentamálaráðið, LV-felagið, Meginfelag Føroyska Studenta og Altjóða Skrivstovuna

Skráin fyri tiltakið liggur á: www.ask.fo/tilfar/MU2006Folder.pdf


# Ver við í næsta leiki! Fíggjarmálaráðið søkir eftir tveimum góðum starvsfólkum.

**FULLTRÚI TIL LØNARDEILDINA**
Sum fulltrúi á Lønardeildini fært tú nógvar spennandi uppgávur og sleppur at menna tíni fakligu og menniskjaligu evni saman við hollum fakfólki. Tú fært ein fjølbroyttan arbeiðsdag, sum tú lutvíst sleppur at skapa sjálvur, og har tú kemur tætt upp á politiska myndugleikan. Og tú fært sjálvandi eitt arbeiðspláss, sum hugsar um framtíð tína og gevur tær góðar møguleikar fyri skeiðum og eftirútbúgving.

Setanartreytir
Setanartreytir og løn eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag. Setanarøkið er alt Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovan og hini stjórnarráðini.

**ÚTBÚGVIÐ SKRIVSTOVUFÓLK TIL LØNARDEILDINA**
Sum skrivstovufólk fert tú at arbeiða við málsviðgerð í lønarmálum. Uppgávurnar eru sera ymiskar og fjølbroyttar, har tú umframt vanligar uppgávur eisini fert at avgreiða m.a. lønar- og setanarviðurskifti og at fyrireika og luttaka í spennandi sáttmálasamráðingum. Tú fært eitt áhugavert starv á einum arbeiðsplássi, sum hugsar um teg og gevur tær góðar møguleikar fyri skeiðum og eftirútbúgving.

Setanartreytir
Setanartreytir og løn eru eftir sáttmálanum við Starvsmannafelagið.

*Freistin at søkja er 2. oktober í 2006.*
*Størvini verða sett sum skjótast.*

*Vilt tú vita meira, ring til Snorra Fjallsbak, stjóra á Lønardeildini, á tlf. 35 22 00. Sí eisini www.lnd.fo*

*Umsóknir við prógvum, lívrensli og møguligum viðmælum skulu sendast til:*
*Fíggjarmálaráðið · Lønardeildin · Postboks 2039 · 165 Argir*

REPROZ

